# Postkassi sprongdur í luftina

Burtursæð frá onkrum ferðsluóhappi og einum sprongdum postkassa, hevur vikuskiftið verið stak friðarligt. Nøkur smærri ferðsluóhapp orsakað av hálkuni hava verið, men hesi høvdu ikki nógv upp á seg. Onkur kærdi um harðan tónleik í einari íbúð í vesturbýnum, men eingin harðskapur ella illstøða var, sum løgreglan veit um at siga. Á Tvøroyri var eitt ferðsluóhapp, har ein ávirkaður bilførari rendi á annan bil, men sum skilst var skaðin kortini ikki stórur. Mest harðliga hendingin fór fram náttina til leygardagin, tá onkur hevði funnið frægd í at spreingja ein postkanna í luftina við fýrverki. Hetta var meldað til løgregluna seinnapartin leygardagin. Men samanumtikið eitt óvanliga friðarligt vikuskifti







# Plagi at fáa mín part

**Av teimum 3.000-4.000 fólkafloksveljarunum, sum velja eftir konservativum og kristnum lívsvirðum, plagi eg at fáa mín part, sigur Óli Breckmann**

VAL 08
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ein av teimum, ið sambært veljarakanningini í Sosialinum fríggjadagin ikki kemur á ting aftur, er Óli Breckmann. Men sjálvur ivast hann í, hvussu eftirfarandi kanningin í veruleikanum er.



*Óli Breckmann hevur ein hóp av kjarnuveljarum, og hann roknar ikki við, at teir fara at svíkja hann hesaferð heldur*

- Fólkafloksveljarar halda ikki nógvan gang, men fara stillisliga á val og stuðla Fólkaflokkinum. Í høvuðsstaðarøkinum búgva eini 1000-1500 borgarligir og sjálvstýrissinnaðir veljarar, og hesi fólkini plaga ikki at svíkja meg, sigur Óli Breckmann.

Hann vísir á, at tað altíð er tengd ein ávís óvissa at einari veljarakanning, og at hendan í Sosialinum fríggjadagin neyvan er nakað undantak. Somuleiðis vísir hann á, at hann fyri tveimum mánaðum síðani til fólkatingsvalið fekk út móti 500 atkvøðum í Suðurstreym og út við 800 atkvøður tilsamans. Og tí ivast hann stórliga í, um undirtøkan er minkað so nógv eftir tveimum mánaðum.

- Vit kenna hvørannan, og hava stuðlað hvønannan, mínir veljarar og eg. Teir sum veljarar, og eg sum tingmaður, sigur Óli Breckmann.

Hann vísir eisini á, at Fólkaflokkurin traditionelt stendur seg illa í veljarakanningum, og at hann sjálvur eisini plagar at fáa lítla undirtøku í hesum kanningum.

- Tað eru minst 3.000-4.000 fólkafloksveljarar, sum velja eftir einum konservativum, kristnum lívssjónarmiði, og har plagi eg at fáa mín part, sigur Óli Breckmann.

Hann leggur aftrat, at Fólkaflokkurin plagar at hava ein góðan endaspurt, sum togar flokkin væl upp á prosentstigalistanum, og soleiðis roknar hann eisini við, at tað fer at verða.

# Stór óvissa í persónligu tølunum

**Leygardagin mannaði Sosialurin nýggja tingið sambært eini kanning, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin. Sambært Jógvani Mørkøre, sum hevur staðið fyri kanningini, kundi umleið helmingurin av teimum avmyndaðu eins væl ikki komið inn, tá stóra óvissan í teimum persónligu tølunum verður havd í huga**

VELJARAKANNING
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Sosialurin prentaði fríggjadagin eina veljarakanning, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin tann 9. og 10. januar. 2069 fólk vórðu spurd í kanningini.

Umframt floksval vórðu respondentarnir eisini spurdir, hvønn persón teir fóru at velja á komandi løgtingsvali. 15 prosent høvdu ikki tikið støðu til, hvønn flokk tey fara at velja.

Vert er at leggja til merkis, at í øllum teimum stóru flokkunum svarar umleið ein fjórðingur av teimum spurdu, at tey ikki hava gjørt av, hvønn persón tey fara at velja. Hetta hevur við sær, at óvissan í teimum persónligu atkvøðutølunum gerst sera stór. Hjá teimum smærru flokkunum ivast veljararnir minni í, hvønn persón teir skulu velja.

Tað ber væl til at síggja ávísar tendensir í teimum persónligu tølunum hjá teimum valevnum, sum standa seg væl, men tá ið hugt verður eftir teimum marginalu valevnunum, gerst munurin millum valevnini minimalur. Tí skal manningin av tí nýggja tinginum sjálvsagt takast við stórum fyrivarni.

### Helvtin kundi verið øðrvísi

Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, hevur um vikuskiftið hugt nærri at teimum persónligu tølunum, og hann metir, at 16 av teimum 33 valevnunum, sum komu í løgtingið sambært kanningini, eins væl kundu dottið út, tí at óvissan er so stór.

23 onnur valevni, ið standa næst á listanum, kundu sostatt eins væl komið ting havandi óvissuna í huga.

Óvissan í teimum smærru tølunum hjá fýra teimum stóru flokkunum er (+/-) 2 prosent. Óvissan hjá teimum smærru flokkunum gerst nakað størri.

Jógvan Mørkøre metir harumframt, at óvissan í undirtøkuni hjá Jacobi Vestergaard, sum var heili 14 prosent, er umleið 4 prosent.

Hesi 23 kundu eins væl komið á ting sambært kanningini:

A: Poul Michelsen (4,2), Bjarni Djurholm (3,8), Óli Breckmann (2,3), Jákup Mikkelsen (2,3) Kitty Mai Ellefsen (1,9) og Kjartan Joensen (1,9)

B: Ingvør Nolsøe (2,0), Rósa Samuelsen (2,0), Helgi Abrahamsen (1,6)

C: Aksel V. Johannesen (2,5), Eyðgunn Samuelsen (2,2), Mamy Dahl Sørensen (2,2)

D: Hans Blaasvær (6,2), Sámal Petur í Grund (6,2), Rúna Sivertsen (4,9)

E: Sirið Stenberg (2,1), Heini O. Heinesen (2,1), Heidi Petersen (1,6), Olga Biskopstøð (1,6), Hergeir Nielsen (1,4)

H: Tordur Niclasen (4,3), Vinjard Johansen (3,2), Egin Henriksen (3,2)

Veljarakanningin í fullum líki

| | Val jan 04 | kanning 9.-10. jan 08 | Í mun til seinasta vald | Tingfólk vald 2004 | tingsessir í kanning | broyting í sessatali |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkaflokkurin | 20,6 | 17,9 | -2,7 | 7 | **6** | -1 |
| Sambandsflokkurin | 23,7 | 24,0 | 0,3 | 7 | **8** | 1 |
| Javnaðarflokkurin | 21,8 | 20,1 | -1,8 | 7 | **7** | 0 |
| Sjálvstýrisflokkurin | 4,6 | 5,9 | 1,3 | 1 | **2** | 1 |
| Tjóðveldisflokkurin | 21,7 | 21,6 | -0,1 | 8 | **7** | -1 |
| Miðflokkurin | 5,2 | 8,7 | 3,5 | 2 | **3** | 1 |
| Miðnámsflokkurin | 0,0 | 1,8 | 1,8 | 0 | **0** | 0 |
| Hin stuttligi flokkurin | 2,4 | 0,0 | -2,4 | 0 | **0** | 0 |
| Tilsamans | 100,0 | 100,0 | | 32 | **33** | |

2069veljarar svaraðu í kanning, gjørd mikukvøld 9. og hóskvøld 10. januar

Tá tey vórðu spurd um val av flokki, svaraðu

| | |
|---|---|
| - at tey ætlaðu at svara blankt | 0,2% |
| - at tey ikki ætlaðu at velja | 1,5% |
| - at tey høvdu ikki tikið støðu til hetta. | 14,1% |

**Viðmerkingar:**
1) Upptalt eftir d'Hondt, tvs. við divisorunum 1,2,3,4,5 osfr.
2) 1/33 ella 3,03 % brúkt sum tinggátt

# Stríðist víðari

**- Eg taki kanningina sum eina ábending um, at eg má gera meira í valstríðnum. Og eg falli í hvussu er ikki í fátt, sigur Heidi Petersen**

VAL 08
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Millum tey mongu, sum sambært veljarakanningini hjá Sosialinum ikki sleppa aftur á ting, er umboðið hjá Tjóðveldi í Norðurstreym, Heidi Petersen. Men hon missir ikki pippið av tí.

- Eg taki hetta sum eitt hint um, at eg má gera meiri í valstríðnum, sigur Heidi Petersen.

Hon heldur ikki, at Tjóðveldi hevur fokuserað upp á persónar heldur enn upp á politikkin hjá flokkinum. Tvørturímóti.

- Vit hava fordeilt uppgávurnar sera væl so ølle ru sloppin framat. Tað eru tekin um, at aðrir flokkar hava valt at fokusera meiri upp á persónar heldur enn flokkin, men soleiðis er tað ikki hjá okkum, sigur Heidi Petersen.

Tað, at Føroyar nú eru eitt valdømi, broytir viðurskiftini hjá teimum, sum eru stillað upp í útjaðaranum, men tað sær Heidi Petersen ikki sum nakran trupulleika.

- Mítt øki er ikki so stórt, og tí má eg fáa atkvøður aðrastaðni í landinum, skal eg koma inn. Ella mugu fólk í økinum standa betri saman. Men tað er í lagi, tí tað eru treytirnar, og eg ræðist so ikki kapping, sigur Heidi Petersen.

Hon vónar samstundis, at fólk ikki bara hugsa um flokkin, men eisini um at hava góða breidd í flokkinum.

Undir øllum umstøðum ætlar Heidi Petersen ikki at tveita handklæðið í ringin, men fer at stríðast víðari við góðum treysti.